# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**Jóna Sørensen 60 ár**



Leygardagin 15. januar fyllir Jóna Sørensen í Trongisvági 60 ár.

Jóna er úr Vági. Sum ung fór hon til Havnar at læra til sjúkrasystir á Landssjúkrahúsinum. Útbúgvingin varð liðug í 1967.

Síðan hevur hon arbeitt sum sjúkrasystir á Suðuroyar Sjúkrahúsi, og í 23 ár hevur hon eisini arbeitt sum skúlasjúkrasystir hálva tíð.

Jóna er dóttir Ragnhild, f. Nicodemusen, ættað av Hamri í Skálavík, og Andreas Djurhuus (Diurin), ættaður úr Porkeri. Hon er yngst av fýra systrum.

Hon er gift við Viberg Sørensen, skipara úr Trongisvági. Tey eiga og reka P/F Seta, sum eigur garnabátin Anitu, á landi er garnavirki og ein maskinverkstaður.

Jóna og Viberg eiga trý børn, Anitu, Ansgar og Ragnar, sum øll búgva á Tvøroyri. Ommu- og abbabørnini eru nú seks í tali, frá seytjan árum og niður til tveir mánaðir.

Í fjør fekk Jóna sær farloyvi, og hon og Viberg fóru at taka sær av løttum og sigla við teirra egna frítíðarbáti, Svaluni.

Tey settu kós suður eftir úr Onglandi í august, men vestan fyri Spaniu sigldi Svalan á okkurt, sum lá í sjónum og sakk undan teimum. Hóast hendan skelkin mistu tey ikki mótið, men keyptu sær ein annan bát við sama navni.

Seinast í november komu tey heim aftur, og ætlanin er at fara avstað aftur síðst í februar. Báturin liggur í Spaniu,og í mars ætla tey at sigla eystur ígjøgnum Miðjararhavið og vænta at vera í Grikkalandi í summar. Tey vænta at sigla nógv í millum oyggjarnar har og fáa væntandi vitjan av børnunum og annars vinum og kenningum.

## Tøkk

Eg takki teimum mongu, ið komu inn á gólvið hjá mær í sambandi við 85 ára føðingardagin 10. januar.

Stóra tøkk fyri blómur, gávur og heilsanir.

*Vinarliga heilsanir*

**Egil Restorff**

# Kjartan Kjartansson 50 ár



Mánadagin 17. januar 2005 fyllir Kjartan Kjartansson, f. Petersen, í Havn, 50 ár.

Kjartan er føddur í Norðdepli, har hann búði, til hann sum seks ára gamal flutti til Vágs.

Hann var í mong ár sjómaður. Fyrsta skipið hann var við, sum 13 ára gamal, var sluppin Johanna TG326.

Síðan sigldi hann við seglhúsbátinum, Pison, og seinni við Sigurfarinum í nógv ár. Hann var við hin minnuliga túrin, tá teir tóku fleiri av manningini upp av einum russiskum skipi, sum var komið í havsneyð.

Hann sigldi við Vestland eina tíð, áðrenn hann fór á skiparaskúla. Í dag arbeiðir hann sum rágevi á viðgerðarstovninum Heilbrigdi á Velbastað.

Kjartan er elstur av fimm systkjum. Mamman er Signy, f. Petersen, úr Hattarvík, og pápin Kjartan Frederiksen var úr Hvannasundi. Hann doyði 9. desember 1954, sum Kjartan er føddur 17. januar 1955.

Saman við Eydnu, f. Olsen, úr Klaksvík eigur Kjartan dóttrina Anju, ið er 30 ára gomul og býr í Havn, og sonin Sonny, ið er 22 ára gamal og býr í Klaksvík.

Kjartan er í dag trúlovaður við Hannebeth Dam í Havn.

Í Norðdepli siga fólk, at Kjartan er norðoyingur, men ogor í Vági siga at hann er vágbingur.

Vælkomst verður í hølunum hjá Odd Fellow, Grønlandsvegur 56, leygardagin 15. januar kl. 19.00.

**Systkini**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæri bróðir mín

**Herman Joensen**
**Hósvík**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til leiðara og starvsfólk á Lágargarði.
Tøkk til prestarnar Hera Joensen og Marjun Bæk, til sangarar, berarar, organist og klokkara.
Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum, ið fylgdu honum.
Tøkk fyri alla hjálp í sambandi við ervi.

**Bergitta Joensen**

Havnar leksikon:

# Ein millión svávuldósir til Brend




*Motivið á svávuldósunum var Eiðiskollur, Risin og Kellingin*

Í 1939 komu á fyrsta sinni svávuldósir við føroyskum motivi á marknaðin. Arthur Brend, sum var heilsølumaður, fekk á eini verksmiðju í Finnlandi framleitt 1. millión svávuldósir

Motivið á svávuldósunum var Eiðiskollur, Risin og Kellingin. Tað var kona Arthur Brend, Ruth Eilsabeth Bagge Brend, sum teknaði motivið til dósirnar.

Myndin vísir, hvussu svávuldósin sá út. Insettu myndirnar eru av Arthur Brend (1880-1959) og Ruth Elisabeth Bagge Brend (1899-1977). Arthur var breti, og Ruth var donsk.

Tey, sum hava okkurt at viðmerkja í samband við hesar svávuldósir, eru vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon 314647 / 273168.



*Arthur Brend (1880-1959) og Ruth Elisabeth Bagge Brend (1899-1977).*

*Myndaeigarar: Myndin av svávulspinnamotivinum: Sigrún Brend*
*Myndirnar av Arthur og Ruth Brend: Føroya Fornminnissavn*

## Tøkk

Vit takka øllum fyri sýnda samkenslu í vøkrum orðum og gerðum í sorgini yvir deyða

**Valdemar Dalsgaard**

**Bozena, Meduna, Maja og Tommy,**
**Mira og Malfríð**

## Tøkk

Vit takka fyri sýnda samkenslu, og tað stóru hjálp vit fingu í samband við jarðarferð hjá mammu, vermammu og ommu okkara

**Almu Sofíu Samsonsen**

tann 12. desember 2004.

**Hansemann, Jancy, Randi, Finn Fróði og Karin**